

*Grønlendingar brynja seg nú av álvara út til at finna kolvetni í undirgrundini*

# Sjey oljufeløg leitiloyvi í Grønlandi

**LEITING** Faroe Petroleum, sum søkti um leitiloyvi, var ov stutt hesaferð

Jan Müller

Tað gekk ikki sum ætlað hjá føroyska oljufelagnum Faroe Petroleum, nú grønlendska ráevnisfyrisitingin hevur gjørt av, hvørji feløg skulu fáa leitiloyvi í Vesturgrønlandi komandi 10 árini. Faroe Petroleum var eitt av umleið 12 feløgum, sum søkti um leitiloyvi men sum varð valt frá saman við fimm øðrum feløgum. Feløgini, sum fingu tillutað leitiloyvi vórðu Shell, Statoil, Gas De France, ConocoPhillips, Cairn Energy, Dong Energy og Maersk Oil. Haraftrat er grønlendska oljufelagið Nunaoil borið felag í øllum loyvum.

At Faroe Petroleum ikki fekk loyvi í Grønlandi kann hava nakað við tað at gera, at fleiri av feløgunum hava søkt um somu teigar. Kappingin hevur rætt og slætt verið sera hørð. Ein onnur orsøk kann vera, at grønlendska ráevnisfyrisitingin bara hevur valt at geva loyvi til tey heilt stóru og tey meðalstóru oljufeløgini, sum peningaliga og tøkniliga eru best fyri.

**Grønlendingar og føroyingar eiga at kunna samstarva í oljutilgongdini, soleðis at man kann læra av hvørjum øðrum til tess at fáa tað mesta og besta burtur úr**

### Trý skandinavisk feløg

Talan er um ikki færri enn trý skandinavisk feløg, sum hava fingið leitiloyvi. Tvey donsk og eitt norskt, Dong, Maersk og Statoil. Við hesum loyvunum í Grønlandi hava norska Statoil og danska Dong víst, at tey kanska meira enn onnur oljufeløg fokusera uppá Norðuratlantshavið, tvs. økið vestan fyri Hetland, økið eystan fyri Føroyar og nú Grønland. Dong er í bólki saman við ConocoPhillips, sum er fyristøðufelag. Statoil er saman við Shell, sum er fyristøðufelag og haraftrat Gas De France, sum eftir øllum at døma er farið at vísa hesum norðaru økjunum ans. Statoil er annars frammanundan rættiliga virkið í Grønlandi. Tað stendur á odda fyri einum samtaki, sum hevur gjørt lovandi kjarnuboringar í Eysturgrønlandi, har fleiri av heimsins størstu oljufeløgum eru við, eitt nú ExxonMobile, Chevron og Shell.

Áhugavert er at síggja, at danska oljufelagið Maersk Oil hevur fingið eitt av leitiloyvunum. Hetta er fyrstu ferð, at felagið hevur víst Grønlandi áhuga. Felagið er fyristøðufelag í einum av teimum sjey loyvunum.

### Burðardygg vinna

Grønlendski landsstýrismaðurin í oljumálum, Ove Karl Berthelsen sigur, at úrslitið av útbjóðingarumfarinum er eitt týðandi stig á leiðini til at fáa ein burðardyggan samfelagsbúskap í Grønlandi. Hann sigur, at feløgini eru vald út eftir teirra fíggjarligu og tøkniligu styrki og hvussu væl fyri tey eru til at handfara trygd, heilsu og umhvørvi. –Trygdin skal vera í hásæti, og eg gleði meg til at fylgja arbeiðinum hjá oljufeløgunum sigur oljumálaráðharrin.

Økið, sum er lutað út, fevnir um góðar 70.000 kvm. Við teimum loyvum, sum latin eru til oljuleiting áður, er samlaða økið, har loyvi eru latin, uppá 200.000 kvm. Umframt feløgini, sum hava fingið tillutað nýggjastu loyvini, eru eisini fleiri onnur feløg við loyvi: Exxon, Chevron, Husky, EnCana, og PA Resources. Seinastu loyvini eru uppá 10 ár og verða kolvetni funnin verða loyvini longd við 30 árum aftrat. Seinastu 10 árini eru tríggir brunnar boraðir í Grønlandi av skotska felagnum Cairn, sum í heyst rakti við bæði olju og gass, tó ikki í rakstrarverdugum nøgdum. Felagið hevur bundið seg til at bora tilsamans 7 brunnar í økinum. Tað er enn ógreitt, hvat feløgini hava bundið seg til at bora í nýggjastu útbjóðingini.

### Samstarv

Fyri Føroyar og føroyingar er tað eisini áhugavert at fylgja við gongdini í Grønlandi, eitt nú tí fleiri av feløgunum, sum arbeiða í føroyskum øki, eisini vísa Grønlandi ans. Eisini er áhugavert at hava jarðfrøðina í huga. Ein kann siga, at Grønland og Føroyar fylgjast í oljuleiting. Átta brunnar eru boraðir í Grønlandi og sjey í Føroyum. Hesar boringar hava staðfest, at talan er um virknar kolvetnisskipanir í undirgrundini. Bæði londini eru tætt heft at fiskivinnuni, sum kann vera svikalig og kunnu verulig fund tí vera við til at skapa hesum londum eina meira trygga búskaparliga framtíð. Tað er so eisini ein sannroynd, at talan er um tvey lond, sum eru í sama ríkisfelagsskapi men sum eisini hava ynski um størri sjálvstýri. Fólkatalið í londunum báðum er so lítið, at tað skulu ikki gerast nógv olju- og gassfund, áðrenn hesi kunnu fáa altavgerandi týdning fyri búskapirnar og harvið fyri teirra framtíð møguliga sum sjálvstøðugar tjóðir í Norðuratlantshavi. Eingin ivi er um, at grønlendingar fylgja væl við gongdini í Føroyum eisini. Samstarv á hesum økinum eisini hevði uttan iva eisini kunnað gagnað tjóðunum, her ikki minst tá hugsað verður um at tryggja eina tilgongd, sum forðar fyri negativum avleiðingum av eini nýggjari tilfeingisvinnu sum hesi. Og sjálvandi eisini hvussu vit kunnu læra av hvørjum øðrum til at fáa tað mesta og besta burtur úr.

*jan@sosialurin.fo*